# Senda 80 tons av klæðum av landinum

**Tvær ferðir um árið savnar Reyði Krossur inn klæði kring um í landinum, og umframt tað, sum selt verður í handlinum hjá felagsskapinum, verða 80 tons send av landinum**

Leo Poulsen

Komandi leygardag verður hálvárliga klædnainnsavnanin hjá Reyða Krossi. Innsavningin fer fram við FK-handlarnar kring landið og í dansistovuni í Vestmanna.

Súni Vinther, leiðari hjá Reyða Krossi í Føroyum, sigur, at tey vanliga fáa upp í tríggjar bingjur hvørja ferð tey savna klæðir inn, og hvør bingja tekur umleið 7,5 tons.

Tað merkir, at við hvørja innsavnan fær Reyði Krossur eini 20 tons, men umframt tað, lata fólk javnan klæðir inn til felagsskapin, og Súni Vinther sigur, at tey senda eini 80 tons av klæðum av landinum til at býta út til tey treingjandi.

- Klæðini verða send til ein miðdepil hjá Reyða Krossi í Horsens, og har verða tey skild og send víðari. Í løtuni verður størsti parturin sendur til Hvítarussland, sigur Súni Vinther.

Ein annar háttur er eisini at pakka teir sonevndu katastrofupakkarnar.

- Hetta eru pakkar, sum fyrst verða pakkaðir á vanligan hátt, men síðani verða teir seymaðir inn í hessian, júst sum vit plagdu at gera við saltfisk fyrr. Síðani verður innihaldið málað á hessianið, so uttan mun til hvar í heiminum hesir katastrofupakkar verða sendir vita móttakararnir beinanvegin, hvat er í pakkanum, sigur Súni Vinther.

Hesir pakkar kunnu eitt nú tveitast út í ófriðaligum økjum, og teir eru ikki tyngri enn so, at teir saktans kunnu berast.

Hava fólk klæðir, ber altso til at lata tey inn við FK-handlarnar kring landið og í dansistovuni í Vestmanna leygardagin 30. oktober frá klokkan 10 til 14.



*Gunvør Joensen er leiðari í handlinum hjá Reyða Krossi, sum saman við øðrum tiltøkum hjá felagsskapinum útvega einari 300.000 krónur um árið*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

## 300.000 krónur

Reyði Krossur rekur tveir handlar í Vágsbotni í Havn. Á niðaru hæddini er bókasøla, har fólk lata bøkur inn, sum onnur so kunnu keypa aftur. Og á miðhæddini er vanligi handilin við serliga klæðum og brúks- og prýðislutum.

Vit hava vanliga nøkur tema gjøgnum árið, og vit hava júst havt leðurklæði sum tema seinastu 14 dagarnar. Nú verður temaið so heit klæðir, sum eru til árstíðina, sigur Gunvør Joensen, sum er leiðari av handlinum í miðhæddini.

Hon sigur, at tey fáa klæðir inn hvønn dag, og tey verða savnað á einari goymslu í Havnardali.

- Hvønn mánadag seinnapart verða klæðini so strokin, hongd upp og prísað. Mikudag sorterað vit klæðini, og oftast verða tey løgd til síðis til ymisk tema, sum til dømis leður klæðir, mótaklæðir ella sum nú hit klæðir, sigur Gunvør Joensen.

Teir báðir handlarnir geva einar 250.000 krónur um árið, og saman við loppumarknaðinum, sum Reyði Krossur eisini hevur tvær ferðir um árið, fær felagsskapurin umleið 300.000 krónur inn um árið.

Alt arbeiði í Reyða Krossi er sjálvboðið, og tilsamans eru tey 24 fólk, ið ansa handlinum, meðan eini 16 eru aftrat at skilja klæðini og at klippa frímerki og annað arbeiði, sum felagsskapurin stendur fyri.

- Nú hava vit so heit klæðir sum tema, og tað er nakað, fólk hava bíðað eftir, sigur Gunvør Joensen.

*leo@sosialurin.fo*

# Vekur ans uttanlands

**Ætlaði skúladepilin í Marknagili er merkisverdur í mangar mátar og verkætlanin hevur eisini vakt ans uttanlands, sigur Helena Dam á Neystabø, landsstýriskvinna.**

Leo Poulsen

Seinnapartin mánadagin varð framløga av skúlaverkætlanini í Marknagili. Tað er samtakið Fuglark, sum vann kappingina at tekna skúlan.

Ætlanin við framløguni var at greiða politikarum og fjølmiðlum frá um verkætlanina, men uppmøtingin var kortini so sum so. Onkrir politikarar vóru møttir, og tað vóru helst teir, sum eru við í fylgibólkinum, sum skal fylgja við byggingini.

Helena Dam á Neystabø er sera væl nøgd við verkætlanina og sigur, at hetta er ein verkætlan, ið eisini hevur vakt ans uttanlands.

Hon upplýsti, at tíðarætlanin higartil hevur hildið, og gongst sum ætlað verður arbeiðið boðið út í juni komandi ár, og spakin skal ætlandi setast í í november næsta ár.

Landsstýriskvinnan segði, at semja er um at draga byggingina nakað út, so í staðin fyri at skúlin skal standa liðugur í 2014, er hetta drigið út til 2015.

Landsverk skal nú rokna upp á, hvussu hendan leingjan av bygginini fer at dýrka verkætlanina, sum upprunaliga er mett at kosta 391 milliónir krónur. Ein upphædd, sum arkitektarnir siga seg kunna haldea seg innan fyri.



*Helena Dam á Neystabø er ferin um verkætlanina, sum hon sigur hevur vakt ans uttanlands*

*Mynd: Álvur Haraldsen*